Vinnumálaráðið

Dagfesting:	5. mai 2026
Mál nr.:	26/10983
Málsviðgjørt:	jd
Ummælisfreist:	n/a
Eftirkannað:	27. apríl 2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um djóravælferð (Djóravælferðarlógin)
(Nágreinað verður, at veiða og fiskiveiða ikki eru fevndar av løgtingslógini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð (Djóravælferðarlógin), sum broytt við § 77 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 8 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verður § 13, stk. 1, orðað soleiðis:

"Veiða og fiskiveiða eru ikki fevndar av løgtingslógini.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tó at løgtingslóg um djóravælferð greitt ásetur, at løgtingslógin ikki er galdandi fyri veiðu og fiskiveiðu, undir hesum eisini grindadráp, so tykist ivi at hava tikið seg upp um hesi viðurskifti. Til tess at beina allan iva av vegnum verður løgtingslóg um djóravælferð broytt.

1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg um djóravælferð hevur til endamáls *at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri tomum sum villum djórum*.

Hetta endamál verður fyrst og fremst rokkið við at tryggja, at djór, sum fólk hava á hondum – húsdjór, nyttudjór og kelidjór – verða hildin undir hóskandi umstøðum. Ásetingin merkir m.a., at djórini skulu avlívast á hóskandi hátt. Fyri húsdjór, nyttudjór og kelidjór merkir hetta, at djórini annaðhvørt skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað, ella at tey verða avlívað soleiðis, at tey doyggja beinanvegin. Hetta ber til, tá talan er um djór, sum fólk hava á hondum.

Støðan er ein onnur, tá ið talan er um djór, sum verða veidd, og sum fólk tí ikki hava á hondum. Grindadráp er at meta sum veiða, og tí er umráðandi at hava fyri eyga skilnaðin millum ávikavist at veiða vill djór og avlíva tom djór.

Djóravælferðarlógin ásetur í § 13, at *veiða og fiskiveiða skal, alt tað ber til, fremjast á djóravælferðarliga fullgóðan hátt*.

Í almennu viðmerkingunum til løgtingslógina stendur m.a. soleiðis: *Ásett verður, at djór í sambandi við avlíving skulu handfarast soleiðis, at tað er djóravælferðarliga hóskandi. Endamálið er, at avlívingin skal gerast við minst møguligari strongd og pínu fyri djórið, men fyrilit eigur eisini at vera havt fyri tí, sum í royndum letur seg gera. Tá ið talan er um villan fugl, villan fisk og súgdjór, sum liva í náttúruni, t.d. haru og grind, verður hildið, at fiski- og avlívingarhættir, sum verða brúktir í dag, eru í samsvari við ta lóggávu, sum verður skotin upp.* [...]

Í serligu viðmerkingunum til § 13 í djóravælferðarlógini stendur m.a. soleiðis: *Djóravælferðin er treytað av tí djóraslagi, talan er um. Greinin snýr seg einans um at veiða og fiska vill djór, og tað er landsstýrismaðurin, ið varðar av hesum øki, ið ásetur nærri reglur. Tað, sum verður mett hóskandi eftir viðkomandi lóggávu, t.e. m.a. fiskivinnu-lóggávuni, grindalóggávuni og lóggávuni um fugla- og haruveiðu, verður vanliga eisini mett hóskandi eftir djóravælferðarlógini.,*

Tá tað í viðmerkingunum til løgtingslóg um djóravælferð verður sagt, at *fyrilit eigur [...] at vera havt fyri tí, sum í royndum letur seg gera*, so merkir hetta júst tað: Grindadráp, sum verður útint í samsvari við tað, sum er ásett í løgtingslóg og kunngerð um grind og annan smáhval, lýkur ta treyt, sum løgtingslóg um djóravælferð ásetur, nevniliga at drápið skal avgreiðast so skjótt, sum tað ber til, og at hvalurin skal drepast so skjótt og pínuleyst, sum tað ber til, og við fyriliti fyri tí, sum í royndum letur seg gera.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at nágreina, at veiða og fiskiveiða, undir hesum eisini grindadráp, ikki eru fevndar av løgtingslóg um djóravælferð. Grind og grindadráp, eins og onnur veiða, er neyvt regulerað í serligari lóggávu.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Til tess at beina av vegnum allan iva um, hvørt løgtingslóg um djóravælferð fevnir um veiðu og fiskiveiðu, undir hesum eisini grind og grindadráp, verður ásett, at løgtingslógin ikki fevnir um veiðu og fiskiveiðu.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum
2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Føroyar luttaka í millumtjóða samstarvinum um havsúgdjór í NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission) um vernd av hvali og umsiting av hvalaveiðu. Grindahvalur og grindadráp er partur av hesum samstarvi.

Føroyskir granskingarstovnar lata umvegis NAMMCO eisini altjóða hvalanevndini IWC (International Whaling Commission) upplýsingar um gransking, vernd og umsiting av grind í Føroyum. IWC hevur tó onki málsføri í mun til grind og annan smáhval.

Bonn-sáttmálin um vernd og umsiting av ferðandi villini djórasløgum fevnir eisini um grind og annan smáhval, og tað sama ger Bern-sáttmálin um vernd av villini djórum og blómum í Evropa og teirra natúrliga búøki. Báðir sáttmálarnir arbeiða við sonevndum listum, sum flokka djóra- og blómusløg eftir, hvussu hótt ella viðbrekin tey eru, ella har tørvur er á størri samstarvi og vitan um hesi sløgini. Mett verður ikki, at tað eru bindingar í nevndu sáttmálum, sum gera, at hetta uppskotið fær avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Lógaruppskotið broytir ikki hesi viðurskifti.

Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. *anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den*

europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. *bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar, eins og lógaruppskotið.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Lógaruppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Staðfest verður, at veiða og fiskiveiða eru ikki fevndar av løgtingslógini; veiða og fiskiveiða eru skipaðar í serlóg.

Til § 2
Ásett verður, at løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 5. mai 2026

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur